


# Føroyskt vatn gekk sum “heitt breyð” á oljumessu

**Jan Müller**

08.09.2013 - 10:12

Oljan.fo

Millum pennar, geymar, regnskjól, keppar og bamsur kundu tey túsundtals vitjandi á altjóða oljumessuni í Aberdeen seinastu dagarnar eisini velja sær føroyskt vatn.

Serstaki blái endurnýtslu pappdunkurin frá “FaroeWater”, sum fyritøkan FaroeWater í Havn stendur fyri, dróg sum ein magnetur fólk til føroyska básin á messuni.

(Tað eru myndirnar í hesi grein eitt gott dømi um.)

FaroeWater fyritøkan, sum stendur aftanfyri at gera hesa reinu føroysku vøruna við kelduvatni av Argjum, kundi ikki annað enn vera errin og fegin um stóra áhugan fyri drekkivatninum úr heimsins reinasta umhvørvi.

“This is indeed pure and fine water”, helt stjórin fyri Offshore Europe og Føroya-vinurin, Malcolm Webb fyri, tá hann fekk eygað á og smakkaði sær á av tí føroyska vatninum.

Eftir at hava verið í Føroyum og hildið fyrilestur á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum í juni í

ár, valdi stjórin fyri Oil & Gas UK, ið umboðar 450.000 fólk innan oljuvinnuna í Bretlandi, hesin kanska mætasti bretski oljustjórin av øllum, at leggja leiðina framvið føroyska básinum.

Men hann var ikki tann einasti, sum fekk høvið at royna føroyska drekkivatnið. Tað gjørdu túsundtals onnur, bæði framsýnarar og vitjandi á messuni eisini.

Vøran hjá “FaroeWater” verður sum skilst enn royndarkoyrd og er ikki av álvara komin út á marknaðin enn. Men messan í skotska oljuhøvuðsstaðnum var so eitt sera gott høvi at fáa hana roynda.

**Umboð fyri Krúnborg Offshore við**
Við føroyska ferðalagnum í Aberdeen vóru eisini tvey umboð fyri Krúnborg Offshore, Birgir Nielsen og Sámal Jacobsen, sum nýttu høvi fyri fyrstu ferð at “snúsa” til hesa risastóru vinnu. Hetta er rætt og slætt fyri at vita, hvat olju- og frálandavinnan er fyri ein verð.

Teir hava verið úti um seg og hava roynt at fáa sambond til fyritøkur, ið kunnu hugsast at hava brúk fyri at leiga komandi frálandaskipið hjá fyritøkuni, tá tað verður klárt at bjóða fram á marknaðinum fyri fyrstu ferð miðskeiðis í 2014.

Myndir:

Stórur áhugi var fyri drekkivatninum hjá FaroeWater á oljumessuni í Aberdeen. Her fleiri av teimum vitjandi umframt føroyskir luttakarar.










